# Norðurlond felags gjaldoyra

Hugskotið um eitt felags norðurlendskt gjaldoyra hevur fingið eitt sindur av umrøðu í teimum íslendsku fjølmiðlunum, eftir at tann íslendska krónan hevur verið viknandi í seinastuni. Í íslendska vinnulívinum halda tey hugskotið vera áhugavert, men fleiri ivast tó í, um tað hevur áhuga í hinum londunum. Víst verður á, at finnlendingar hava evruna, danska krónan er tengd at evruni, og sviar eru í ES, men uttan fyri felags evrusamstarvið.




*Íslendingar umrøða hugskot um felags norðurlendskt gjaldoyra (Mynd: Vísir)*



*Boriskipið Deepwater Expedition, sum Mikael Gren hevur verið við í nøkur ár. Tá hann um ein mánaðans tíð fer til India, fer hann at vera knýttur at tveimum sokallaðum "jack-ups". Familjan flytir við honum til India at búgva í 2 ár*

# Leiðin gongur til India

**Fyri at vera betri fyrireikaðir til eina føroyska oljuvinnu, so áttu føroyingar at fingið sær royndir aðrastaðni fyrst. India tekur seg nógv fram sum oljutjóð í hesum døgum, og stórur tørvur er á arbeiðsmegi, tí er tað ein møguleiki at hyggja tann vegin, heldur Mikael Gren**

*Hilmar Simonsen*

Eftir at boriverkætlanin í Marokko var liðug tann 20. februar byrjaði Deepwater Expediton at sigla til Suðurafrika. Skipið steðgaði í Las Palmas í 3 dagar og verður væntandi frammi í Suðurafrika 19. mars. Í Suðurafrika skal skipið klassast og umvælast, og gerast klárt til nýggja uppgávu í India. Hetta arbeiðið tekur einar 80 dagar.

- Í India skulu vit bora fyri eitt oljufelag ið kallast Reliance. India tekur seg nógv fram sum oljutjóð í hesum tíðum, so um føroyingar kundu hugsað sær it sloppið at roynt seg, so er ein møguleiki at hyggja tann vegin, heldur Mikael Gren fyri, og hann heldur fram:

- Oljufeløg ynskja fólk við royndum, men veruleikin er, at slík fólk finnast ikki í dag.

Tí noyðast feløgini at leita eftir fólk við øðrum royndum innan aðrar vinnur, tað verið seg verkfrøðingar, fólk innan shippingvinnu og fiskivinnu. Sjálvandi krevur tekniski parturin fólk við serligum førleika, men tað er brúk fyri so nógvum øðrum fólkum eisini, sigur hann.

Mikael Gren sær fegin, at fleiri føroyingar fáa fótin fyri seg í oljuvinnuni, tí hetta vildi gjørt okkum betri før fyri at tikið ímóti einari komandi føroyskari oljuvinnu.

- Í nógvum londum, sum leita eftir olju, er einki lokalt fólk skikkað til oljuvinnuna. Hetta kundu føroyingar byrgt upp fyri við at fingið sær royndir frammanundan, sigur Mikael Gren.

Í India skal Mikael Gren sjálvur royna seg í nýggjum starvi.

- Uppgávurnar hjá varastjóranum (assistant rig manager) vóru vorðnar ov umfatandi. Tí verður hetta starvið býtt upp í tvey nýggj størv, sum kallast "performance rig-manager" og "asset rig-manager".

Mikal Gren hevur fingið bjóðað starvið asset rigmanager, og hesum hevur hann tikið av. Hann flytir eisini av boriskipinum Deepwater Expedition á tveir sokallaðar "jack-up" boripallar. Transocean hevur 8 jack-ups í India, og Mikael verður sostatt knýttur at tveimum teirra.

Transocean, sum er heimsins størsta veitingarfelag innan oljuvinnu, eigur 140 boripallar í alt og hevur 20.000 fólk í starvi.